**Frá Badmintonfelagnum í Havn**

# BADMINTON

Badmintonárið byrjar aftur 1. sept. 2000.

Tilmelding verður í høll felagsins týskvøldið 22. aug. 2000.

Børn & unglingar kl. 19.00.
Vaksin kl. 20 ella á tlf. 214515.

**Nevndin**

# Aliflaki til sølu

Longd. 30 m. Breidd 12 m.

Vælegnaður at nýta í sambandi við útfóðringsskipan til alibrúk.

Verður seldur sum hann liggur.

Møgulig boð skulu vera inni innan 1. september.

**P/F Alistøðin á Bakka**
625 Glyvrar · Tlf. 447485

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
The Course Centre at Langasandur

# Skeiðsrøðir

Í tíðarskeiðnum september 2000 til mars/apríl 2001 verða hesar skeiðsrøðir hildnar. Avmarkað luttakaratal: 8-10 eftir tilmeldingardagin. VSR eru 6 vikuskiftisskeið frá fríggjakvøldi til sunnudags; MVR eru 6-8 miðvikuskeið frá týskvøldi til hósdags.

**VSR-1: Enskt byrjanarstig –** 6 vikuskifti
**VSR-2: Enskt lágstig (KET)** – 6 vikuskifti
**VSR-3: Enskt framhaldsskeið (PET)** – 6 vikuskifti
**VSR-4: Føroyskt fyri øll** – 6 vikuskifti
**VSR-5: Faroese for non-Nordic Speakers** – 6 vikuskifti
**MVR-1: Enskt hástig (FCE)** – 6 miðvikur
**MVR-2: Enskt í Altjóða Samskifti, Handli og Umsiting** – yrkisskeið (CEIBT), 8 miðvikur
**MVR-3: Altjóðaligt læraraskeið í enskum** – yrkisskeið (CEELT), 6 miðvikur
**MVR-4: Enskt í Ferðavinnuni** – yrkisskeið (CTE), 6 miðvikur.
**MSR-1: Hvussu menna vit smávirki og -fyritøkur á bestan hátt?** 4 modul, skipað í vikuskiftum. Ætlað leiðslu og starvsfólki.

Skeiðsmappa við øllum upplýsingum um Skeiðsdepilin, skeiðini, kostnaðir, tilmeldingarblað o.a. fæst við at skriva til Depilin ella ringja til avgreiðsluna, tlf. 422574, ella á heimasíðuni.

*Reikað verður fyri umbidnum skeiðum. Avsláttur til virki, stovnar. o.o.*

**SKEIÐSDEPILIN**
438 Langasandur
Tlf. 422574 • Fax 422521
Heimasíða: www.depilin.fo

# Undirvísingar- og mentamálstýrið
## Mentamáladeildin

# ENDURLÝSING
# Deildarleiðarar
## til Sjúkrasystraskúla Føroya

Vegna ov fáar umsóknir verður við hesum lýst av nýggjum eftir deildarleiðara til sjúkrasystraútbúgvingina og deildarleiðara til almanna- og heilsuútbúgvingarnar.

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraskúli Føroya fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd.

### Deildarleiðari fyri sjúkrasystraútbúgvingina

**Høvuðsuppgávur**
- Vararektari tá rektarin er burturstaddur/burturstødd
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingini
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**
- er sjúkrasystur við viðkomandi framhaldsútbúgving ella eftirútbúgving
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av sjúkrasystraútbúgvingini
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri lesandi, lærarar og starvsfólk

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

### Deildarleiðari fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar

**Høvuðsuppgávur**
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi næmingum
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**
- hevur framhaldsútbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og gjarna innan miðnámsútbúgvingar
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Vit bjóða**
Tvey størv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø verður at senda til:
Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **21.08.2000**, kl. 15.00.
Størvini verða at seta skjótast tilber.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 215052 ella Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 314545 (privat) ella tlf. 355050 eftir 14.08.2000.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og ymiskum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya*** *verður útbygdur til eisini at umfata tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, og fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir. Onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið er ein miðallong framhaldsútbúgving, 45 mðr., og hin rásin fevnir um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Hesar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*

*Lýsið í* **sosialinum**



**Starv**

# Stýrimaður

Við hesum verður søkt eftir stýrimanni til M/B Sildberan at seta í fast starv frá 1. november 2000. Viðkomandi, sum settur verður, skal til eina og hvørja tíð kunna verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins sum fyriskipað av leiðsluni.
Viðkomandi skal kunna avloysa skiparan og motorpassaran.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Arbeiðsuppgávurnar umborð**
Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipum Landsins er at nøkta landsins tørv á fólka- og farmaflutningi. Hetta verður gjørt eftir fastlagdari ferðaætlan og annars verður skipað fyri serflutningi við ferðafólki kring oyggjarnar.
Hjá Sildberanum er dagliga farleiðin Sand-Skúvoy.
Arbeiðstíðin er tvær vikur umborð og síðani ein vika avspáking, og siglt verður hvønn dag í vikuni.
Tveir manns eru við Sildberanum, skipari og stýrimaður/motorpassari og umstøður eru ikki at búgva umborð.

**Starvið fevnir um**
Stýrimaðurin skal vera við til at tilrættaleggja ein effektivan dagligan rakstur, og at tryggja at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.
Stýrimaðurin skal eisini verða við til at:
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja at skipið verður lastað í samsvari við altjóða krøv
- Meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarva við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum skipari og dugnaskaparbræv í motorpassing
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri enn 3 ár
- Roykkavari/sløkkileiðari ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleiki til formlig krøv og royndir viðvíkjandi rakstri av ferðamannaskipum
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

*Strandfaraskip Landsins*
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. september 2000.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara

Tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*
*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Dagligur leiðari

Fyri P/F Hólmalaks á Gomlurætt verður søkt eftir dagligum leiðara.

**Starvið**
Leiðarin skal hava dagligu leiðsluna um hendi, ið m.a. fevnir um samskipan av framleiðslu og sølu umframt umsiting.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Rætti umsøkjarin hevur royndir og evni at leiða og samskipa virksemið í einari framleiðslufyritøku.

Royndir innan alivinnu er ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

**Umsóknin**
Umsókn verður at senda skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 1. september 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Reinert, stjóra, á tlf. 217679 ella 311861.

**P/F HÓLMALAKS**
Villingadalsvegur 39
FO-100 Tórshavn · Føroyar

# Skrivstovufólk

Vegna NCC Vágarkonsortiet, verður søkt eftir skrivstovufólki til byggiplássið Vágatunnilin, at byrja primo sept.

Arbeiðið fevnir um: EDV bókhald
Lønarútgjald
Telefonavgreiðslu v.m.

Umsóknir verða at senda til:

**P/F BYGGITEK** BT
**Stiðjagøta 3 - tlf. 317585**
**100 Tórshavn**



Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

# Sosialpsykiatri I

Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í:

**Sosialpsykiatri I**
**í døgunum 18/9–29/9 2000**

**Endamál:**
At skeiðluttakarin fær eina grundleggjandi vitan um, og innlit í tað sosialfrøðisliga umráðið. Eisini skal luttakarin megna at skilja ímillum tørvin hjá sjúklinginum og egnan tørv og mørk.

At skeiðluttakarin nemur sær eina grundleggjandi vitan um tey mest vanligu sálarligu brekini og viðgerðina av hesum.

**Skeiðið er ætlað:**
Eftirlitshavandi fólki innan sosial og heilsuøkið, heimahjálparar, sosial- og heilsurøktarar, sjúkrahjálparar. Somuleiðis verkstaðarassistentar, ið arbeiða innan hetta økið.

**Kostnaður:**
5.500,-

**Skeiðleiðari:**
Lærari frá Skolen i Hammer Bakker í Vodskov.

**Tilmelding:**
**áðrenn 1. september 2000**

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúla á tlf. 311957 (mánadag– fríggjadag kl. 8–12 & 13–16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621

# Lærlingur

**søkist til handil okkara á Hálsi sum skjótast**

Læran umfatar:
Samskifti við viðskiftafólk, sølu, skeið og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

Vit vænta:
At tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

FHS ella HH er ein treyt.

Skrivlig umsókn skal vera Profa Farvur í hendi í seinasta lagi 31. August 2000.

team 85 • 31 65 11

**Profa Farvur**
Postboks 3137 - Staravegur 5 - FO-110 Tórshavn